# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 20. november 2009



Føroyska U21-manningin, ið byrjaði dystin ímóti Lettlandi mikudagin. Aftast frá vinstru Dánjal Davidsen, Rógvi Holm, Pól Jóhannus Justinussen, Øssur M. Dalbúð, Jóan Símun Edmundsson og Christian Restorff Mouritsen, liðformaður. Fremst frá vinstru Rógvi Poulsen, Róaldur Jacobsen, Jóan Pauli Dahl Jakobsen, Kristoffur Jakobsen og Jóhan Troest Davidsen

Mynd: Fótbóltssambandið

# Føroyar favorittur

**Tað var ikki gamalt, at eitt føroyskt landslið var favorittur, men neyvan slepst undan tí leiklutinum í morgin, tá U21-landsliðið aftur spælir útidyst í EM-undankappingini – hesa ferð ímóti Andorra, ið hvørki hevur fingið stig ella mál í kappingini higartil**



Hilmar Jan Hansen

Eftir eina drúgva ferð úr lettiska høvuðsstaðnum Riga, ið var umvegis fyrst Keypmannahavn og síðani Barcelona, kom U21-landsliðið seint í gjárkvøldið til Andorra. Í dag verður so onkur løtt venjing og annars fyrireiking til EM-undankappingardystin ímóti Andorra, sum verður í morgin klokkan 14, føroyska tíð.

Vanliga eru Føroyar á pappírinum liðið, ið skal inn at berjast við tey stóru og royna at prógva sín tilverurætt, men í morgin er leiklutin ein annar. Takkað veri 1-0 útisigrinum á Lettlandi mikudagin og teimum sjey stigunum, føroyska U21-landsliðið hevur vunnið í hesi EM-undankappingini, eru Føroyar at rokna sum favorittur undan dystinum ímóti Andorra.

– Teirra U21-landslið er nýtt og hevur ikki tær stóru royndirnar, og í hesi kappingini hava teir hvørki fingið mál ella stig, sigur Bill McLeod Jacobsen, ið saman við Heðini Askham hevur ábyrgdina av U21-landsliðnum.

– Vit hava ein lítlan trumf í Boga Løkin, ið vónandi verður klárur til Andorra-dystin, eftir at hann sat uttanfyri ímóti Lettlandi, tí hann hevur verið skaddur í knænum. Men eisini hava vit aðrar frískar menn at seta inn, um vit halda okkum hava brúk fyri tí.

### Eingin undirmeting

Heldur ikki Jóhan Troest Davidsen, sum eftir 14 landsdystir á A-landsliðnum aftur er á U21-landsliðnum, vil upp á nakran máta undirmeta Andorra, sum er greitt botnlið í okkara bólki.

– Eg kenni lítið og einki til Andorra, annað enn tað, at teir ikki hava staðið seg so væl. Men hetta átti at verið ein dystur, vit hava møguleika at vinna. Nú hava vit akkurát vunnið, so sjálvandi hava vit gott sjálvsálit, men tað er sera umráðandi fyri okkum, at vit fara inn á vøllin við sama hugburði sum ímóti Lettlandi, sigur hann.

Fremsta uppgávan hjá venjarunum verður at fáa spælararnar at taka uppgávuna í fullum álvara, so teir ikki fara inn á vøllin, sum var dysturin vunnin frammanundan. Hetta er ein fella, A-landsliðið onkuntíð datt í tey fyrstu árini, so nú er at vóna, at ungu U21-menninir, ið hava avrikað so nógv í hesi EM-undankappingini, eru greiðir yvir, at Føroyar saktans kunnu fáa somu lagnu sum Lettland og Russland, ið Føroyar hava vunnið á í hesi kappingini!

Dysturin verður spældur í Andorra la Valle, og sigast kann annars, at hetta er eitt smátjóðamøti upp á fleiri mátar, tí dómari, hjálpardómarar og fjórði dómari koma allir úr San Marino. UEFA-umboðið kemur úr Hvítarusslandi og UEFA-dómaraeygleiðarin úr Albania.

## Klaksvíkingar verja kong

**Klaksvíkar Talvfelag er hálvt stig framman fyri Sandavágs Talvfelag, nú fýra umfør eru telvað í liðkappingini. Havnar Telvingarfelag, sum á triðja plássi er tvey stig aftanfyri, eigur tó ein dyst á**

Um vikuskiftið er fimta umfar í liðkappingini í talvi, og síðani verður vetrarsteðgur. Í løtuni er Klaksvíkar Talvfelag á odda og hevur 11½ stig, og síðani kemur Sandavágs Talvfelag við 11 stigum og Havnar Telvingarfelag, sum hevur 9½ stig, men eigur ein útsettan dyst á ímóti Vestmanna Talvfelag, sum er nummar fýra við átta stigum. Hesin dystur verður telvaður næsta sunnudag.

Líkt er til, at kappingin í vetur verður líka spennandi sum í fjør, tá fýra lið lógu til at gerast føroyameistarar, líka til seinasta umfar. Havnar Telvingarfelag er á pappírinum størsti favoritturin, men fremstu liðini eru sera jøvn og taka øll stig frá øllum. Hinvegin sær út til, at niðurflytingin verður eitt stríð millum næstbestu klaksvíkingarnar og Tofta Talvfelag, sum hava ávikavist 3½ og ½ stig.

Sunnudagin klokkan 14 verða dystirnir í fimta umfari, og tá møtast í Havn Havnar Telvingarfelag og Klaksvíkar Talvfelag, í Vestmanna Vestmanna Talvfelag og Sandavágs Talvfelag, og á Toftum tekur Tofta Talvfelag ímóti Klaksvíkar Talvfelag 2.

### Hinar deildirnar

Í 2. deild er Havnar Telvingarfelag 2 trygt á odda við 12 stigum, Havnar Telvingarfelag 3 hevur níggju stig og Klaksvíkar Talvfelag 3 hevur átta stig. Í 3. deild, har øll liðini møtast eina ferð og telvað 11 umfør í staðin fyri tey vanligu 10, er Vestmanna Talvfelag 3 á odda við 16½ stigi, Skopun hevur 14½ og Gøta 10½ stig.

Í unglingadeildini stendur á jøvnum millum Klaksvíkar Talvfelag og Vestmanna Talvfelag, sum hava 12½ stig í part, meðan Sandavágs Talvfelag og Havnar Telvingarfelag A koma við teimum á baki við 11½ stigi í part, so her kann roknast við harðari og góðari kapping millum júst hesi fýra liðini, ið eru javnsterk. Aftan fyri tey koma Rókur og Havnar Telvingarfelag B, sum ikki hava so royndar telvarar sum hini liðini.